Álit

í

løgtingsmáli nr. 21/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vápn v.m.
(Reglur um útflutning av vápnum og um atgongd til vápnaskránna)

Løgmaður hevur lagt málið fram tann 15. september 2020, og eftir 1. viðgerð tann 22. september 2020 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 28. september og 21. oktober 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Skjótisamband Føroya, Dátueftirlitið, Umhvørvisstovuna, Michael Boolsen, fúta, og løgmann.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Skjótisamband Føroya hevur mælt til, at tað eigur at verða sett sum krav, at føroyskir skjúttar hava vápnaprógv við trygdarskeiði, tá teir ferðast uttanlands. Tað er ikki innan karmarnar av hesum lógaruppskoti møguligt at gera broytingaruppskot, sum gongur Skjótisambandinum á møti. Nevndin skal tó viðmerkja, at tað er møguligt hjá løgmanni at áseta reglur um hetta í kunngerð, tí § 3 c í vápnalógini heimilar at áseta nærri reglur um krøv til vápnaprógv. Nevndin heldur, at ynskið hjá Skjótisambandinum er væl grundað, men at tað í síðsta enda er upp til løgmann at avgera, um slíkt krav skal setast.

Uppskotið hevur við sær, at løgreglan fær beinleiðis atgongd til vápnaskránna. Lógin inniheldur ikki nakrar ásetingar um, hvørjar treytir eru galdandi í hesum sambandi. Hesar reglur eru at finna í dátuverndarlógini. Dátueftirlitið hevur upplýst fyri nevndini, at tað hevur ikki viðmerkingar til, at løgreglan fær atgongd til vápnaskránna. Men við tað at løgreglan er danskt málsøki, hevur Dátueftirlitið ikki eftirlit við virkseminum hjá løgregluni í Føroyum. Nevndin heldur ynskið hjá løgregluni vera væl grundað. Umhvørvisstovan hevur ongar viðmerkingar til, at løgreglan fær atgongd til vápnaskránna.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 27. oktober 2020

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg
	Hervør Pálsdóttir	